# ítróttur

Nr. 189 • týsdagur • 5. oktober 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Tað er aftur lívligt á Sevmýri

**Framtíðin tykist síggja ikki so galin út, men í fyrstu atløgu verður tað ógvuliga stórt tak at halda tørn um plássið í fremstu deildini, sum TB tryggjaði sær leygardagin**

UPPFLYTARIN
*Jóannes Hansen*



*Tað er eitt ungt lið við nøkrum royndum kreftum, sum nú hevur spælt aldursforsetan í føroyskum fótbólti upp aftur í ovastu deildina*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Sjálvsagda vendingin er, at leygardagin kom TB upp á pláss aftur. Síðani fyrstu niðurflytingina í 1988 hevur aldursforsetin í føroyskum fótbólti, TB, fleiri ferðir verið í næstbestu deildini og vent. Vónin hevur hvørja ferð verið, at tað skuldi eydnast aftur at vera við í kappingini, har tað er mest hugaligt at vera. Nú eydnaðist tað at flyta uppaftur, men í fyrstu atløgu verður á Tvøroyri ikki rokna við nógvum øðrum enn, at TB skal stríðast fyri at varðveita plássið í 1. deild.

Hetta er í fyrstu atløgu. Tá ið hugt verður eitt sindur longri fram í tíðina, eru teir ikki sørt bjartskygdir á Tvøroyri. Úrslitini í yngru deildunum boða frá, at tað eru evnaríkir spælarar í TB, og um rætt verður borið at, og umstøðurnar annars vera at liva og virka har suðuri, so átti hetta um ikki so mong ár at sæst aftur í TB.

Tað eru ikki so nógv ár síðani, at tað var óhugsandi, at yngstu liðini hjá TB skuldu kappast í meistarabólkinum. Í ár vunnu smádreingirnir og piltarnir bronsu, og smápiltarnir vunnu silvur í FM kappingini. Oftast er tað meiri spurningurin, hvørjir møguleikar verða givnir teimum ungu og børnunum heldur enn, um evnini eru har. Í ár hevur Eyðun Svalbard tikið sær av smádreingjaliðnum, meðan Pól F. Joensen hevur tikið sær av piltunum og smápiltunum.

Fleiri av hesum knassunum fara um nøkur ár at vera við til at lyfta TB. Júst nú uppflytingin er vorðin veruleiki, er stóri spurningurin, hvussu tað fer at verða næsta ár.

Sofus Laðanberg er formaður í TB. Hann er drívmegin, tá ið tað ræður um at fáa fíggjarliga grundarlagið undir felagnum at rigga. Í dagliga yrki sínum er hann norðanfjørðs. Í fleiri ár sigldi hann um Vestmannasund. Nú er hann stýrimaður á Dúgvuni, sum siglir um Leirvíksfjørð. Tað hevur ikki verið verri fyri TB kassan, at formaðurin hevur siglt um Vestmannasund og nú siglir millum Klaksvík og Leirvík. Har er nógv fólk at hitta, sum ikki javnan eru á Tvøroyri, og so dettur onkur króna her og onnur har í TB kassan.

Á Tvøroyri eru tað eisini fleiri, sum arbeiða í stuðulsfelagnum og sum eru við í øðrum tiltøkum, sum hava til endamál at økja um inntøkurnar og á annan hátt at skapa karmar um og grundarlag fyri fótbóltinum á Tvøroyri.

Í fótbóltsdeildini er samfelagsfrøðingurin Bjarni Mortensen formaður. Tað er ivaleyst ikki at taka munnin ov fullan at siga, at tað fyrst og fremst eru formaðurin í felagnum og so formaðurin í fótbóltsdeildini, sum fyrst og fremst hava við tað fótbóltsliga at gera.

## Nógv at fáa upp á pláss

Bjarni Mortensen sigur, at tey í felagnum hava leingi arbeitt út frá, at møguleikin fyri uppflyting skuldi gerast veruleiki. Men hann heldur samstundis, at tað er nógv arbeiði eftir at gera, áðrenn TB kann roknast at vera ført fyri at fara í stríðið fyri at varðveita nývunna plássið.

Í fyrstu syftu verður á onkrum økjum byrjað so at siga niðanfyri nullpunktið. Dan Mortensen, sum í fleiri ár hevur verið liðformaður og ein av bestu TB spælarunum, er farin av landinum at arbeiða. Ein av gávuríku ungu monnunum, Bárður Dimon, ætlar sær at fara sama veg, og Rasmus Nolsøe, sum eisini er evnaríkur ungur spælari, ið er uppaldur á Sevmýri, spælir við HB.

– Tá ið tað viðvíkur tí fótbóltsliga, so eru tað tríggir lutir, sum vit fokusera uppá. Allir eru teir neyðugir, og hvør sær eru teir ivaleysa stórir. Eitt er, at vit mugu leggja stóra orku í at menna ungu og í 1. deildarhøpi ikki royndu spælararnar, sum nú skulu royna seg. Í hesum bólkinum eru lutfalsliga nógvir. Eitt annað er, at stórur dentur skal leggjast á organisatiónina ella skipingina av liðnum. TB hevur spælt rættuliga álopskent í ár. Tað fer neyvan at bera til at halda fram á sama hátt, nú mótstøðan verður av heilt øðrum slagi. Tað verður heldur eingin meining í bara at verja og sparka burtur. Nú skal finnast fram til, hvat er skilabest. Og fyri tað triðja mugu vit fáa nýggjar spælarar. Bæði heilt góðar spælarar at styrkja um toppin og so aðrar spælarar, sum kunnu vera við til at styrkja um breiddina á liðnum. So her er nóg mikið at arbeiða við, staðfestir Bjarni Mortensen.



*Rómurin var øgiligur á Tvøroyri, tá ið Emmanuel Larby hevði lagt TB á odda 2-1 stutt fyri tíð, og harvið sent teir á 1. deildarkós*
*Mynd: Áki Bertholdsen*

Jon Johannesen hevur verið leikandi venjari í gott og væl tvey ár. Tá ið vit fregnast um, hvussu tað verður við venjara næsta ár, sigur Bjarni Mortensen, at hetta ikki er avgjørt enn.

– Vit eru akkurát fluttir upp. Hetta verður ein av fyrstu uppgávunum, sum vit mugu fara undir at loysa.

*Hvussu verður tað við spælarum?*

– Vit hava tríggjar veteranar á liðnum. Her hugsi eg um Jon Johannesen, Óla Johannesen og Einar Petersen. Harafturat hava vit havt ganesisku Daniel, sum er 194 centimetra høgur miðvallari og Immanuel, sum er álopsspælari. Enn er eingin formliga avtala gjørd við hvørki teir ella aðrar. Men vit fara nú undir hetta arbeiðið, og tað ræður um at spæla kortini rætt, so vit koma í so mikið fræga støðu, sum tað ber til. Tað krevst, um vit skulu hava møguleika at røkka málinum, sum vit halda, at tað er møguleiki fyri at røkka, sigur Bjarni Mortensen.

Hann heldur eisini, at fótbóltshýrurin aftur er vorðin góður á Tvøroyri:

– Í níti árunum mistu vit so nógv fólk, at tað næstan var neyðugt at byrja av nýggjum. Áhugin millum fólkið her suðuri hevur altíð verið stórur, men tað hevur ikki altíð kenst so hugaligt. Nú sær framtíðin hampuliga góð út. Tað eru fleiri, sum vilja lyfta og bera, og so er at vóna, at vit næsta ár fara at fáa fólk til eitt lið, sum verður ment at kappast við hini.



# B36 eigur framvegis metið

**Síðani ásetingarnar fyri tíggju árum síðani vórðu broyttar, soleiðis at tað í staðin fyri tvey vóru givin trý stig fyri at vinna, hevur B36 bæði rokkið hægsta og næsthægsta stigatalinum**

10 ÁRA AFTURLIT
*Jóannes Hansen*

Landskappingin, sum tað leygardagin varð lagt lok á, var tann tíggjunda síðani, at ásetingarnar fyri úrtøku burturúr vunnum dystum vórðu broyttar, soleiðis at tað í staðin fyri tvey skuldu gevast trý stig fyri at vinna.

HB er meistari hesa ferð við 41 stigum. Í teimum tíggju kappingunum frá 1995 og til 2004 hevur hetta verið stigatalið, sum meistarin oftast er endaður á. Merkisvert er tað, at HB hevur vunnið meistaraheitini trý tey seinastu árini - í 2002, 2003 og í ár - við 41 stigum hvørja ferðina. KÍ var meistari við 41 stigum í 1999, og tá ið GÍ í 1995 vann fyrstu kappingina undir nýggju skipanini, var úrtøkan hjá gøtumonnum eisini 41 stig.

Hægstu úrtøkuna hesi tíggju árini hevur B36 staðið fyri, og hóast teir bara í gásareygum vóru næstbestir hesa ferð, og tað ivaleyst svíður, at grannarnir fyri norðan fyri triðju ferð á rað fingu gullið um hálsin, so kunnu teir í árstalsfelagnum reypa sær av, at teir bæði eiga hægsta og næsthægsta stigatalið. Í 1997 setti B36 met við 48 stigum, og í 2001 fingu teir 46 stig.

GÍ eigur meistaraskapin við fægst stigum hesi tíggju árini. Tá ið teir vóru meistarar í 1996, var tað við 39 stigum.

Tá ið tað valdast samlaða stigatalið, og tá ið hugt verður eftir muninum í stigum frá meistaraliðnum og aftur til tey næstu, eru tað ivaleyst fleiri, sum siga, at tað hevur ikki so nógv at siga, tí tað valdast um, nær tað er vorðið greitt, at eitt lið er vorðið meistari. HB var meistari undan triðju síðsta umfarinum í ár. Síðani tá spældu teir tríggjar ferðir javnt. Um teir høvdu verið kroystir av kappingarneyta, so er væl hugsandi, at teir høvdu havt vunnið kanska allar tríggjar tær síðstu ferðirnar ella í hvussu so er onkra av uppgerðunum.

Hesa ferð var HB sjey stig frammanfyri B36 á silvurplássinum. Í fjør var HB fýra stig frammanfyri B36, og í fyrraárið vóru teir fimm stig frammanfyri NSÍ.

Størsti stigamunurin frá meistaraliðnum og aftur til nummar tvey tey seinastu tíggju árini var í 1995, tá ið GÍ var meistari við 41 stigum. HB var næstbest við 33 stigum.

Minsti munurin á meistara og næsta kappingarneyta seinastu tíggju árini var í 1996. Tá var GÍ meistari við 39 stigum ella sama stigatali, sum KÍ fekk. GÍ varð meistari, tí teir høvdu betri málmun. Um skipanin við innanhýsis dystum, sum nú er galdandi, hevði verið galdandi tá, so hevði tað verið KÍ, sum hevði verið meistari.

## TB minst úrtøku

Um tað verður hugt eftir úrtøkuni hjá liðnum, sum er endað aftast og harvið er flutt beinleiðis niður, so eigur TB, sum leygardagin tryggjaði sær sess í bestu deildini, tvey met. Í 1996 fluttu teir niður við trettan stigum. Hetta er hægsta stigatalið, sum nakað felag er endað á aftasta plássinum við seinastu tíggju árini.

Í 2002 flutti TB niður við seks stigum. So lítla úrtøku hevur einki annað felag fingið í bestu deildini seinastu tíggju árini.

Tvørámenn hugsa ivaleyst nú um, hvussu nógv stig teir skulu vinna næsta ár, um teir skulu sleppa undan aftasta sessinum og harvið beinleiðis niðurflyting. Í ár flutti B68 niður við átta stigum. Í fjør flutti FS Vágar niður við ellivu stigum, og í 2001 flutti FS Vágar niður við níggju stigum. Ivaleyst kann tað nýtast sum tummulfingur regul, at um tað eydnast at vinna fleiri enn tíggju stig, so skal tað vilja illa til, um tað ikki fer at eydnast at sleppa undan aftasta sessinum. So kunnu teir í TB og aðrir droyma seg fram til, hvørjum hesi stigini skulu vinnast ímóti.

**Gull, silvur og niðurflyting 1995-2004**

| Ár | Gull | Stig | Silvur | Stig | Aftast | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1995 | GÍ | 41 | HB | 33 | NSÍ | 8 |
| 1996 | GÍ | 39 | KÍ | 39 | TB | 13 |
| 1997 | B36 | 48 | HB | 41 | B71 | 7 |
| 1998 | HB | 45 | KÍ | 38 | TB | 8 |
| 1999 | KÍ | 41 | GÍ | 39 | ÍF | 10 |
| 2000 | VB | 40 | HB | 38 | Sumba | 10 |
| 2001 | B36 | 46 | GÍ | 42 | FS Vágar | 9 |
| 2002 | HB | 41 | NSÍ | 36 | TB | 6 |
| 2003 | HB | 41 | B36 | 37 | FS Vágar | 11 |
| 2004 | HB | 41 | B36 | 34 | B68 | 8 |




**Eyka tyrluflúgving í heystfrítíðini**

Í heystfrítíðini verður eyka flúgving við tyrluni.
**Mánadagin 11. oktober** og **leygardagin 16. oktober** verður flogið sum fríggjadag. Talan er um eina roynd fyri at vita, um undirtøka er fyri slíkari eykaflúgving.

Vanligir ferðaseðlar kunnu eisini bíleggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel 34 10 60 · Faks 34 10 01 · tyrlan@atlantic.fo
www.atlantic.fo






**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2005 er mánadagin 1. nov. 2004**

**Í mars 2005 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist við óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2005 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 660 í telefonbókini 2004,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 2.000,00 kr. (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 1. november 2004 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**
(A) Standardlýsing .................................. kr. 700,00
(B) Innramming...................................... kr. 800,00
(E) Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) . kr. 25,00
(sí dømi á s. 658 í Telefonbókini 2004)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/Rættingarblað til Gulu síður er á síðu 659 í telefonbókini 2004, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo
FØROYA TELE